FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 12. mai 2021
J. nr.: 21/07581
Viðgjørt: BAB

Svar upp á fyrispurning nr. 52-135/2020 frá Hendrik Old, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um útbjóðing í sambandi við Fámjinstunnilin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa soleiðis fyri, at útbjóðingin at gera tunnil og veg í sambandi við Fámjinstunnilin verður boðin út í tveimum, tvs. tunnil og vegagerð hvør sær?

Svar:

Ynskiligt hevði verið at verkætlanin varð boðin út í tveimum. Avbjóðingin er, at grótið úr tunlinum skal brúkast at gera vegirnar. Tí kunnu vegirnir ikki gerast uttan at tunnilsarbeiðið er í gongd samstundis. Landsverk metir, at kostnaðarmetingin verður ein heilt onnur, um so er at verkætlanin skal býtast í tvey. Verandi kostnaðarmeting á 169 mió.kr. byggir á, at talan er um eina samlaða verkætlan.

Í løtuni ber til hjá byggifyritøkum at søkja um undangóðkenning at geva tilboð uppá nýggjan Fámjinstunnil. Freistin er 13. mai.

Ætlanin er sostatt framvegis, at verkætlanin verður bjóðað samlað út áðrenn summarfrítíðina og at arbeiðið kann byrja seinni í ár.

Tinganes, 12. mai 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum